# Vilja hava betur samskifti innan Heilsuverkið

**Leygardagin klokkan 15.00 verður fyrilestur hildin í kantinuni á Klaksvíkar Sjúkrahúsið. Evnið verður sjúkan Glykogenosis Typa III. Tað verður Ulrike Steuerwald, barnalækni, ið fer at fortelja sjúklingum og avvarðandi meir um hesa sjúku.**

FYRILESTUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

*Sum foreldur at sjúklingum ynskja vit eisini eitt betur samskifti innan heilsuverkið viðvíkjandi sjúkuni.*

*Hetta sigur Rúna Sivertsen, sum eigur eina 6 ára gamla dóttur, ið líður undir hesu sjúku.*



**Klaksvík:** – Fólk sum heild vita lítið um hesa sjúku, sum hí mun til onnur lond hevur ein stóran títtleika í Føroyum. Sum foreldur at sjúklingum ynskja vit eisini eitt betur samskifti innan heilsuverkið viðvíkjandi sjúkuni.

Hetta sigur Rúna Sivertsen, sum er ein av fyrireikarunum aftan fyrilesturin.

Rúna Sivertsen eigur sjálv eina 6 ára gamla dóttur, ið líður undir hesu sjúku.

### Vánaligt samskifti

Fyrilesturin er ætlaður sum undirvísing fyri sjúklingum, foreldrum og øðrum avvarðandi. Harafturat vóna fyrireikararnir eisini at síggja kommunulæknar, heilsusystrar og fólk innan heilsuverkið annars á fyrilestrinum.

– Ulrike bjóðaði seg sjálv fram til at hava fyrilesturin, tí hon metir, at avvarðandi, eins væl og heilsuverkið sum heild, hava tørv á meiri upplýsing um hesa sjúku, sigur Rúna Sivertsen.

– Vit, sum eru foreldur og avvarðandi, ynskja at fáa eitt betur samskifti í lag innan heilsuverkið viðvíkjandi hesi sjúku. Hóast ein verður føddur við sjúkuni, so skuldi tað ganga eitt heilt ár, áðrenn sjúkan varð endaliga staðfest hjá dóttir míni. Hetta, hóast at heilsusjúkrasysturin longu frá byrjan varð greið yvir, at gentan ikki var sum flestir nýføðingar. Gentan var heldur hyldlig, og beinagrindin var ikki so sterk, sum hon átti at vera. Hetta skrivaði heilsusjúkrasysturin í heilsubókina hjá gentuni, men hóast eg vísti fleiri læknum bókina, so var eingin, ið fekk illgruna um, at orsøkin kundi vera Glykogenosis Typa III, greiðir Rúna frá.

### Sjáldsom sjúka

Frá 1953 til 1970 vistu læknar ikki nógv um hesa sjúku, men gjøgnum kanningar, sum Ulrike Steuerwald saman við læknum úr Kiel hevur staðið fyri, er vitanin munandi økt.

Glykogenosis Typa III er ein ressisiv arvalig sjúka, sum viðførir, at livurin ikki klárar at niðurbróta glykogen til glukosu. Hetta viðførir aftur ein stóra mongd av glykogen í livrini. Hetta ger, at livurin veksur og sjúklingurin fær ein stóran búk.

Tá barnið verður tannáringur hendir eitthvørt í kroppinum, ið viðførir, at livurin fær eina vanliga stødd. Harafturat leggur blóðsukrið seg nú í eina fasta legu, og hetta ger, at sjúkan hvørvur.

Hóast berara-sjúkur vanliga ikki hvørva, so kennir eingin enn orsøkina til, at júst hendan sjúkan hvørvur, tá sjúklingurin gerst tannáringur.

Fyrr gekk sum oftast long tíð, áðrenn sjúkan kundi staðfestast hjá einum barni, men í dag kann sjúkan longu beint eftir føðingina staðfestast við eini blóðroynd.

Eisini er møguligt við eini blóðroynd at staðfesta, um ein er berari av hesi sjúku.

Tilsamans eru í dag staðfestir 14 tilburðir av sjúkuni í Føroyum, og er hetta nógv samanborið við onnur lond.

### Vóna at síggja nógv fólk

Fyrireikararnir vóna at síggja nógv fólk til fyrilesturin, sum verður hildin í Kantinuni á Klaksvíkar Sjúkrahúsið leygardagin.

Eftir sjálvan fyrilesturin bjóða fyrireikararnir ein hugnaligan kaffimunn, so høvi verður til at práta eitt sindur saman, áðrenn farið verður aftur til hús.

# Tjaldpláss klárt í summar

**Nú ferðamannatíðin nærkast, verður arbeitt dúgliga við at gera eitt nýtt tjaldpláss úti í Grøv Klaksvík.**

FERÐAVINNAN
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** - Tjaldpláss skal gerast úti í Grøv til komandi summar. Økið er klárt til nýtslu, men umstøðurnar til brúsu og annað eru ikki nóg góðar enn. Men tað verður arbeitt við at seta ein bygning har úti í stand. Hesin bygningur er umleið 200 fermetrar til støddar og hevur staðið tómur í tíggju ár. Her skulu ferðafólkini kunna gera nýtslu av brúsu og WC umframt vaskimaskinu og einum lítlum tekøki, men tey kunnu ikki búgva inni har, sigur Christian Olsen, leiðari á Norðoya Kunningarstovu.

Hetta kemur at verða í tíðarskeiðinum hálvan juni til hálvan august. Hinar mánaðirnar í árinum verður bygningurin nýttur til útibarnagarð hjá Klaksvíkar Kommunu.

Útferðir verða eisini fyrireikaðar. Tað verða bæði gongutúrar og túrar kring Norðoyggjar í báti.

– Gongutúrarnir vóru sera vælumtóktir í fjør, men vit høvdu ikki so gott veður í fjør, so bátatúrarnir kundu verið betri og fleiri. Men so mugu vit bara vóna, at tað verður betri í ár. Tá farið verður kring oyggjarnar í báti, verður altíð farið úr Klaksvík, men harvið er ikki sagt, at vit ikki kunnu byrja og enda í Leirvík, sigur Christian.

Á øllum trimum gistingarhúsunum í Norðoyggjum hava tey fingið fyrispurningar og bíleggingar til komandi summar. Á Hotel Norð á Viðareiði frætta vit, at týskarar, bretar og norðurlendingar hava spurt seg fyri hjá teimum. Miriam Heinesen, eigari, sigur, at tað sæst ein lítil øking í fyrispurningunum samanborið við seinasta ár.

Hini bæði, Vallaraheimi og Klaksvíkar Sjómansheim, siga, at tað er nakað tað sama í ár, sum í fjør og tað eru bæði bólkar og einstaklingar, sum bíleggja.

### Nýggjur økisfaldari

Landið er býtt upp í seks øki, sum tað nú verður arbeitt við at gera ein faldara um. Tað er eitt samstarv í millum Ferðaráð Føroya og tey seks økisfeløgini.

– Endamálið við hesum faldara er, at hann skal lýsa hvørt einstaka økið og tey tiltøk, sum verða har, so at ferðafólkið kann njóta tey tilboðini, ið eru á staðnum, og harvið lættari kann vitja støðini, sigur Birgit Nolsø frá Ferðaráð Føroya.

– Faldarin er komin fyri at verða, og ætlanin er, at hann skal hava eina livitíð upp á tvey ár. áðrenn hann verður dagførdur fyrstu ferð, sigur Birgit.






Harry Benjaminsen, formaður í Tofta Arbeiðsmannafelag:

# Vit halda okkum bara til sáttmálan

**- Tað tænir ongum endamáli at seta limirnar upp ímóti felagnum, tí tað eru limirnir sum gjøgnum sítt fakfelag hava gjørt tær lógir og reglur, sum feløgini virka eftir og vilja halda fast um, sigur Harry Benjaminsen, sum eisini er stjórnarlimur í Føroya Arbeiðarafelag**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Sosialurin hevur viðgjørt málið um døgurðatíman á Fiskavirking á Toftum.

Herfyri vrakaði Tofta Arbeiðsmannafelag eitt uppskot, sum leiðslan á virkinum saman við álitisfólkunum hevur gjørt. Uppskotið var fyrst til atkvøðugreiðslu millum arbeiðsfólkið á virkinum, og her var ein tepur meiriluti fyri at avtaka døgurðatíman og hava ein matarsteðg uppá 20 minuttir í staðin.

Uppskotið snúði seg um at hava 20 minuttir matarsteðg millum kl. 12 og 13 og ein kaffisteð fyri døgurða og ein eftir døgurða uppá 15 minuttir hvør.

Leiðslan á Fiskavirking sigur seg hava tilsamans 40 minuttir at ráða yvir, um fólkið skal sleppa heim kl. 16 og fáa fyri fullan dag. Men við tað, at kaffisteðgirnir eru 15 minuttir í staðin fyri 10, sum hevði verið innanfyri rammurnar, er neyðugt at arbeiða til kl. 16.10, um fólk ikki skulu missa løn.

Birgir Nónsgjógv segði við Sosialin herfyri, at kaffisteðgir uppá 10 minuttir eru órealistiskir, tí fólk fáa ikki stundir at lata seg úr arbeiðsklæðunum, drekka kaffi og so lata seg íaftur klæðini uppá 10 minuttir; tí skutu leiðsla og álitisfólk upp, at kaffisteðgirnir skuldu vera 15 minuttir í staðin.

### Halda seg til sáttmálan

Harry Benjaminsen er formaður í Tofta Arbeiðsmannafelag og nevndarlimur í Føroya Arbeiðarafelag.

Hann sigur, at felagið hevur havt málið til viðgerðar og kann ikki góðtaka, at fólk skulu arbeiða til kl. 16.10, tí hetta er í stríð við sáttmálan.

- Men áðrenn málið nakrantíð kom til felagið, ringdi umboð fyri Fiskavirking á Toftum til mín og spurdi, hvussu málið kundi loysast, um døgurðatímin skuldi avtakast og matarsteðgur setast í staðin. Umboðið upplýsti tá, at ætlanin var at arbeiða til kl. 16.10, men her gjørdi eg beinanvegin greitt, at tað fór felagið undir ongum umstøðum at góðtaka.



*- Sáttmálin sigur, at arbeiðsdagurin er 8 tímar og skal arbeiðast útyvir hesar 8 tímarnar, skal yvirtíð gjaldast, sigur Harry Benjaminsen, formaður í Tofta Arbeiðsmannafelag*

- Sáttmálin sigur, at arbeiðsdagurin er 8 tímar og skal arbeiðast útyvir hesar 8 tímarnar, skal yvir tíð gjaldast. Eftir uppskotinum skuldu limirnir hjá okkum arbeiða í 8 tímar og 10 minuttir, og tað er í stríð við sáttmálan.

Felagið noyðist at halda fast um vunnin rættindi, tí verður lorað á einum øki, kunnu vit spyrja okkum sjálvi, hvat tað næsta verður. Vil Fiskavirking gjalda arbeiðsfólkinum yvirtíð fyri hesar 10 minuttirnar, seta vit okkum ikki upp ímóti hesum, sigur formaðurin í Tofta Arbeiðsmannafelag.

Harry vísir á, at døgurðatímin gevur 100% yvirtíð, og felagið sær onga meining í at avtaka hendan, um tað kemur aftur um brekkur í seinna enda.

- So, hetta er ikki eitt lítið málið, sum leiðslan á Fiskavirking vil gera tað til. Hetta er ein spurningur um at halda fast um vunnin rættindi, og tað vilja vit gera.

### Hvør vil avtaka døgurðatíman?

Harry hevur eisini sett sær spurningin, hvør tað er, sum vil avtala døgurðatíman á Fiskavirking á Toftum.

- Eru tað tey, sum arbeiða á virkinum og ikki búgva á Toftum. Tey fara kanska ikki heim til døgurða kortini.

Hann sigur, at felagið hevur ikki greiðu á, hvussu nógv toftafólk vilja hava matarsteðg í staðin fyri døgurðatíma.

- Hetta sigi eg ikki, tí felagið hevur nakað ímóti matarsteðgi í staðin fyri døgurðatíma. Tað hava vit ikki, um hetta verður gjørt í tráð við sáttmálan, sigur hann.

Formaðurin í Tofta Arbeiðsmannafelag sigur, at virkisleiðarin á Fiskavirking á Toftum, Birgir Nónsgjógv, heldur eigur konsentrera seg um virkisleiðsluna enn um fakfelagsspurningar, tí teir spurningarnar taka felagið og limirnir sær av.

- Tað tænir ongum endamáli at seta limirnar upp ímóti felagnum, tí tað eru limirnir sum gjøgnum sítt fakfelag hava gjørt tær lógir og reglur, sum feløgini virka eftir og vilja halda fast um.

Harry sigur, at felagið als ikki vil vísa nakran illvilja mótvegis limunum, ei heldur móti Fiskavirking á Toftum sum arbeiðsgevara. Bæði limirnir og arbeiðsgevarin eru altíð vælkomin at venda sær til felagið.

- Vit vilja bara halda fast um vunnin rættindi. Gera vit ikki tað, enda vit á einum síðuspori, sigur Harry Benjaminsen at enda.

Nýggja smápartafelagið, Sílnet í Gøtu:

# Fer í fyrsta lagi at framleiða og selja útgerð til alivinnuna

**Kristian Sofus í Lambanum vónar, at felagið kann hava eini 4-6 fólk í arbeiði um ikki so langa tíð**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Eitt nýtt smápartafelag er um dagarnar skrásett hjá Skráseting Føroya. Felagið eitur Sp/F Sílnet og hevur heimstað í Gøtu.

Stjóri í felagnum er Kristian Sofus í Lambanum, sum hevur arbeitt hjá P/F Vónini í eini 15 ár. Hann gavst hjá felagnum á nýggjárinum.

### Framleiðsla og søla

Endamálið hjá felagnum er at reka handil, framleiðslu og annað starv í hesum sambandi, stendur í skrásetingini.

Kristian Sofus í Lambanum sigur við Sosialin, at felagið hevur leigað eina høll, sum P/F Skygni eigur í Syðrugøtu. Hetta felag er eitt dóttirfelag hjá P/F Varðanum, sum eigur Trónd í Gøtu.

- Vit byrja í smáum og á berum botni. Ætlanin er í fyrsta lagi at leggja okkum eftir at keypa net og framleiða nótir til alivinnuna. Sostatt fara vit at byggja upp eitt netavirki. Men vit fara eisini at leggja okkum eftir at framleiða og selja aðra útgerð til alivinnuna og fiskivinnuna annars.

Kristian vísir á, at Vónin og Netavirkið á Oyri eru teir einastu, sum framleiða nótir og selja útgerð til alivinnuna, og hann heldur, at her er ein lutfalsliga stórur marknaður, tí nógv úterð verður innflutt.

- Sjálvt netið verður keypt uttanlands, men nótirnar verða seymaðar og gjørdar til í Føroyum. Eingin framleiðir net til alivinnuna her heima.

Stjórin vísir á, at higartil hava føroyingar serliga keypt net úr Danmark og Noregi, men nú verða eyguni í størri mun vend eystureftir.

- Vit fara at kanna allar møguleikar fyri at fáa greiðu á, hvar netið fæst best og bíligast, sigur hann.

### 4-6 fólk í arbeiði

Sum nevnd, byrjar Sp/F Sílnet á berum botni og hølini, sum felagið hevur leigað, eru ikki serliga stór.

- Men hetta er so ein byrjan hjá okkum, sigur Kristian.

Hann vónar, at felagið kann hava eini 4-6 fólk í arbeiði um ikki so langa tíð.

Spurdur, um ætlanin er at selja línureiðskap og annað til útróðrarbátar, sigur stjórin, at tað ætla teir ikki.

- Vit fara serliga at leggja okkum eftir at arbeiða við neti og so selja aðra ali-og skipsútgerð við síðuna av.

Um Sp/F Sílnet eisini fer at framleiða trol, dugir hann ikki at siga í løtuni.

- Hølini eru ikki serliga stór, men nú fáa vit at síggja, hvat verður í framtíðini, sigur Kristian Sofus í Lambanum.

# Fýra trolarar landað í Saltangará

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Mikudagin og hósdagin løgdu fýra trolarar veiðina upp til Fiskavirking í Saltangará.

Jaspis og Ametyst, sum vóru teir fyrru, høvdu tilsamans 1400 kassar, meginparturin upsi.

Safir og Smaragd landaðu hósdagin; teir høvdu tilsamans 2000 kassar, og hjá teimum var eisini meginparturin upsi.

Ivasamt er, um Fiskavirking í Saltangará keypir meira fisk hesa vikuna, tí nóg mikið er inni til alla hesa vikuna.

- Keypa vit onkra last aftrat, verður ein partur av fiskinum ivaleyst goymdur til komandi viku, siga tey í Saltangará.

Arbeitt hevur verið á virkinum alla hesa vikuna. Mánadagin og týsdagin arbeiddu tey fisk, sum lá niðurfyri frá síðstu viku